## Bæði kynini í sama bát

Sum nakað nýtt verður ein fjúrtandi róður fyriskipaður á ólavsøku. Hesin er fyri øll, sum eru fylt 15 ár, og kunnu bæði kvinnur og menn manna sama bát. Róð verður við seksmannaførum frá málinum undir Havnarskrivstovuni og út um eina boyu, sum liggur nakað uttan fyri molan. Síðani verður róð innaftur. Treytin fyri at taka lut er, at rógvarar ikki skulu hava tikið lut í FM-kappingini í ár, og kunnu í mesta lagi átta bátsmanningar taka lut. Kappingin fer fram millum 8- og 10-mannafarsróðurin.



## Svein Rógvi verður í Árnafirði

Árnafjarðar Róðrarfelag hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at Svein Rógvi Nielsen eisini verður venjari hjá felagnum komandi róðrarár. Svein Rógvi varð knýttur at ÁRF, tá tvær FM-stevnur vóru farnar. Í báðum hesum var Árnfirðingur á aftasta plássinum, men síðani eru úrslitini betrað munandi. Og megnar Árnfirðingur á ólavsøku at vinna seg framum Ørv, vinnur báturin bronsu í FM-kappingini.

# Fleiri mynstra av flaggskipinum

**Í finaluni í 10. árinum við Eysturoyingi kunnu føroyameistararnir vinna 33. róðurin við flaggskipinum hjá róðrarfelagnum á Skálafjørðinum, sum á mannfólkasíðuni er betri fyri enn nakað annað**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tá ið 10-mannaførini eru farin um málið undir Skipafelagnum ikki so seint seinnapartin í morgin, verður punktum sett fyri róðrarárið 2007.

Longu undan síðsta startinum verður tosað um, hvussu tað fer at verða næsta ár. Uppundir Ólavsøku hevur tað ofta verið at hoyrt um rógvarar, sum ikki hava ætlað sær at taka eitt tørn afturat.

Men so hevur tað víst seg, tá ið nakrar vikur eru farnar, at hugurin at venja og kappast er kyknaður aftur.

Veruleikin í hesum hevur við sær, at tað ikki altíð er so lætt at fáa greiðar útmeldingar. Rógvarnir eru varnir at siga, um teir nú fara at gevast ella ikki.

Tveir av óføru meistarunum umborð á Eysturoyingi hava fyri stuttum her á síðunum givið til kennar, at teir ætla sær ikki at rógva næsta ár. Nú sær tað út til, at tað eru fleiri enn teir báðir umborð á Eysturoyingi, sum vit glæsiligu sigursrøðini í ár siga kappróðrinum farvæl – fyribils í hvussu so er:

- Vit hava ikki tosað um hetta. Men tað liggur í kortunum, at tað eru fleiri, sum ætla sær at mynstra av. Vit eru fleir, sum eru omanfyri tredivu og dygst upp undir tredivu. Hugurin at venja og rógva er, sum hann altíð hevur verið. Tað vísir seg tó, at tá ið menn arbeiða við at seta føtur undir egið borð, so verður avlopstíðin lítil.

Hetta sigur Sámal Hansen, sum man vera ein tann best kendi innan kapproðurin tey seinastu árini. Hann hevur áður róð við Eysturoyingi. Nú hevur hann í nøkur ár hildið um stýrisvølin, og so er hann tann, sum tey seinnu árini hevur smíðað flestu kapproðrarbátarnar.

Hjá teimum, sum vilja vera fremstir og bestir, fer nógv tíð til kapproðurin:

- Vit venja hvønn dag. Í ár hava vit verið hvønn dag uttan sunnudag í bátinum. Sunnudagarnar hava vit vant í maskinunum. Aðrar dagar hava vit umframt í bátinum viðhvørt eisini vant í maskinunum og viðhvørt styrkisvant, greiðir Sámal frá.



*Hjá fleiri av verandi manningini á Eysturoyingi verður ólavsøkuróðurin helst tann seinasti við flaggskipinum av Glyvrum*

Ludvík Justinussen, sum er ein av teimum, ið nú ætlar at leggja árina, hevur staðið fyri venjingunum. Hetta hevur hann gjørt í samráði við danska Eskild Ebbesen. Eskild er framvegis aktivur rógvari. Nú stríðist hann við at kvalifisera seg til OL í Kina næsta summar. So talan er um rættan altjóða meistararógvara, sum vegleiðir føroysku meistarunum.

Hetta er 10. árið, at Eysturoyingur, ið var ein av fyrstu bátunum, sum Sámal smíðaði, er við í kappingini.

Um tað í morgin við sigri eydnast at seta punktum fyri fína árinum, so verður tað 33. FM sigurin hjá Eysturoyingi. Tey fyrstu árini – 1998-2002 – vóru seks FM róðrar á skránni. Síðani 2003 hava sjey FM róðrar verið á hvørjum ári. Eysturoyingur vann allar seks róðrarnar í 1998, og í 1999 endurtóku teir bragdið. Í 2002 vunnu teir tveir róðrar, í 2003 tríggjar, í 2005 vunnu teir seks ferðir (allar róðrarnar uttan á Norðoyastevnu, tá ið teir vóru næstfyrstir), í fjør vunnu teir tríggjar ferðir, og í morgin eru teir á Eysturoyingi favorittar at vinna fyri sjeyndu ferð í ár.

Eingin hevur verið við at vunnið allar 32 sigrarnar. Men um tað í morgin eydnast at vinna, so fara Ludvík Justinussen og Tóroddur Vang at mynstra av Eysturoyingi við 31 gullmedaljum. Tað er met. Teir báðir vóru ikki við í 2002. Sámal Hansen var ikki við í 2002, og hann var ikki við í fjør. Tað vil siga, at bátasmiðurin og stýrimaðurin fer at eiga 28 gullkrónur sum minni um gylta skeiðið við Eysturoyingi – um tað fer at eydnast at vinna í morgin.

Kvígur tú fyri framtíðini hjá Eysturoyingi spyrja vit Sámal Hansen, sum svarar, at hann er bjartskygdur:

- Heiðabáturin hevur staðið seg framúr væl í ár. Tað er upplagt, at teir fara at hjálpa teimum, sum verða eftir umborð hjá okkum. Tjaldurs dreingirnir royndu seg fyrstu ferð í fjør. Teir hava havt stóra framgongd, og tað kann væl hugsast, at onkrir teirra hava hug og evni at halda fram. Og so eru tað aðrir, sum hava hildið frí í ár, og sum kanska fara at fáa hug og umstøður at taka eitt tørn afturat næsta ár, heldur Sámal Hansen.

# Metini halda frí í morgin

**Vánirnar verða ikki roknaðar at vera góðar fyri, at nýggj met fara at verða sett í ólavsøkuróðrinum hesa ferð**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

3.52.00. Sambært hagtals yvirlitinum á heimasíðuni rogving.fo er 901,3 metra teinurin av Argjahøvda og inn undir Skipafelagið eina ferð rógvin í so góðari tíð. Tað var á Ólavsøku í 1992, tá ið 10-mannafarið Skálabáturin setti hetta metið.

Tað verður ikki roknað við, at 15 ára gamla ólavsøkumetið hjá Skálabátinum ella ólavsøkumet í nakrari av hinum bátastøddunum verður tikið í morgin.

- Eitt er venjingarstøðan hjá rógvarunum. Um tað bara var hon, sum var avgerandi, so kundi okkurt metið verið sett hesa ferð. Men streymur, ætt og vindstyrki hevur nógv at siga. Um hann er undan, eru fyritreytirnar bestar fyri góðum tíðum. Veðurmaðurin sigur frá høgætt. Róðrarlíkindini verða ivaleyst góð, men tað verður ímóti, og harvið verður neyvan talan um nakað met, verður sagt av teimum, sum hava skil fyri veðrið og kapproðri.

Í Havnar Róðrarfelag hava teir áður sagt, at besta ættin til kapproður á Ólavsøku er vestan. Tá er góð lívd at leggja bátarnar undir Argjahøvda, og tá rógva teim undan. Tá ið Skálabáturin setti metið í 1992 var hann vestan, og tað var frískur vindur. Uttan at taka nakað frá óføru skálamonnunum, so sigur tað seg sjálvt, at veðrið var í parti við teimum fyri fimtan árum síðani.

Onkra ferðina hevur verið um reppið, at metið hevur verið tikið. Næstbestu tíðina eigur Havnarbáturin, sum á Ólavsøku í 2001 vann við 3.52.03.

Sambært hagtalsyvirlitinum var besta vinnaratíðin hjá Eysturoyingi, sum í ár og fleiri av seinastu tíggju árunum hevur verið stinnastur, í 1988, tá ið teir vunnu við 4.02.60.

### Ikki altíð so neyvt

Tá ið tosað verður um mettíðir í kapproðri, so undirstrika teir serkønu, at tað ikki skal leggjast so nógv í tíðirnar, sum tað eitt nú verður gjørt í svimjing, renning og súkkling.

Róðrartíðirnar eru eisini skrásettar frá tí tíðini, tá ið tað bara var leysur startur. Tá kom tað meiri enn so fyri, at bátarnir vóru farnir nakað inn um startmálið, tá ið skotið geltið.

Á Ólavsøku hevur tað verið fastur startur síðani 1979. Í fjør varð nýggjur fastur startur lagdur, og hann verður eisini nýttur í ár.

At tað í so mong ár hevur verið fastur startur átti at borið við sær, at kapproðrartíðirnar á Ólavsøku áttu at verið neyvari, enn tær kanska hava verið á øðrum stevnum.

Kapproðrarhugað kenna skrásettu tíðirnar, og tey, sum ganga høgt uppí hetta, hava so ofta kannað tíðirnar. Tað gera tey við stoppuri at lurta eftir upptøkum frá Útvarpinum.